

*Hjá hoyvíkingum tykist størsti spenningurin snúgva seg um, hvørt tað skal eydnast Bjarna Wardum at gerast ovastur á máltindinum*

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 10 - 0 - 0 | 638 | 393 | 245 | 32 |
| 2 | Neistin | 11 | 7 - 1 - 3 | 528 | 452 | 76 | 23 |
| 3 | Stjørnan | 10 | 5 - 1 - 4 | 533 | 461 | 72 | 20 |
| 4 | VB | 10 | 6 - 1 - 3 | 518 | 520 | -2 | 19 |
| 5 | StÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 430 | 516 | -86 | 9 |
| 6 | Kyndil | 10 | 1 - 1 - 8 | 493 | 584 | -91 | 6 |
| 7 | Sóljan | 11 | 1 - 0 -10 | 429 | 643 | -214 | 4 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 11 | 9 - 0 - 2 | 724 | 608 | 116 | 28 |
| 2 | VÍF | 10 | 8 - 0 - 2 | 655 | 562 | 93 | 27 |
| 3 | StÍF | 10 | 8 - 0 - 2 | 619 | 583 | 36 | 22 |
| 4 | Tjaldur | 11 | 4 - 0 - 7 | 606 | 664 | -58 | 12 |
| 5 | Kyndil | 10 | 4 - 1 - 5 | 518 | 585 | -67 | 11 |
| 6 | H71 | 10 | 0 - 2 - 8 | 618 | 676 | -58 | 8 |
| 7 | KÍF | 10 | 1 - 1 - 8 | 579 | 641 | -62 | 7 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 196 | (30) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 167 | (51) |
| Ioana Rápa | VÍF | 165 | (41) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 157 | (64) |
| Gabriella Fekete | VB | 131 | (33) |
| Regina Radó | VB | 117 | (28) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 113 | (18) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 110 | (16) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 110 | (41) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 104 | (20) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 99 | (9) |
| Alina Olaru | StÍF | 99 | (10) |
| Gunnleyg Berg | Neistin | 94 | (19) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 89 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 89 | (4) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heini Joensen | Neistin | 176 | (51) |
| Bjarni Wardum | H71 | 167 | (34) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 153 | (17) |
| Høgni Klein | Kyndil | 135 | (10) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 129 | |
| Sámal Joensen | VÍF | 128 | (22) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 128 | (36) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 125 | (12) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 125 | (17) |
| Finnur Hansson | H71 | 122 | (23) |
| Artur Johansen | StÍF | 118 | (15) |
| Durica Tomic | KÍF | 113 | (35) |
| Ingi Olsen | VÍF | 109 | (12) |
| Iljan Topic | KÍF | 106 | |
| Áki Olsen | VÍF | 104 | (11) |

H71 — Tjaldur 36-43 (17-20)

# Málskjótingin setti met

**Eitt lið sum ger 36 mál plagar vanliga at vinna stórt, men hoyvíkingar taptu við sjey málum móti Tjaldri. Dysturin fer í søguna sum málríkasti dysturin við 79 málum — tað er eitt meira enn gamla metið**

HONDBÓLTUR – MENN
*Sveinur Tróndarson*

Tað er ikki á hvørjum degi, at tað vera skotin so nógv mál sum í dystinum millum H71 og Tjaldur, sum varð leiktur í høllini á Hálsi leygardagin. Úrslitið av dystinum gjørdist, at Tjaldur vann við 43 málum móti 36 og tað merkir, at tað eru skotin 79 mál í dystinum. Hetta er í hvussu er nýtt ársmet í fyrstu deild. Gamla metið áttu Neistin og KÍF tá liðini hittust í høllini á Hálsi leygardagin fyri jól. Tann dystin vann Neistin við 47 málum móti 31.

Nógvu málini í dystinum millum H71 og Tjaldu hava við sær, at dómaraseðilin er eitt stórt rót. Pláss er ikki fyri so stórum málskjótaravirksemi og tí hava skrivararnir valt at gera nýggjan teig mitt á blaðnum heldur enn at taka ein nýggjan seðil, men lat tað fara. Dysturin er farin afturum.

**Vantandi verjuspæl**

Tað var eisini Tjaldur, sum legði betri fyri í Høllini á Hálsi leygardagin. Runavíkingar trýstu hoyvíkingar frá byrjan og sjálvt um H71 megnaði at javna áðrenn fimm minuttir vóru leiktir, var tað bara stokkutur hiti. Tjaldur legði frá aftur landi alt fyri eitt og hesaferð megnaðu hoyvíkingar ikki at koma aftur í aftur. Í hvussu er ikki nógv mikið aftur í aftur til at skapa spenning í dystinum.

Hálvleiksstøðan var 17 til H71 og 20 til Tjaldur, og í seinna hálvleiki sprakk Tjaldur enn meira frá H71. Hoyvíkingar royndu at svara aftur, men tá teir vórðu raktir av fimm útvísingum innan fyri tíggju minuttir, var einki at gera hjá teimum. Tjaldur fór spakuliga men trygt frá H71 sum hesaferð ikki megnaði at koma afturíaftur.

Samanumtikið má tó sigast, at tað helst er tekin um vánaligt verjuavrik, at ein dystur gerst so málríkur.

Í allarflestu førum vinnur eitt lið, sum ger 36 mál ein dyst, men tað megnaði H71 ikki. Ístaðin loyvdu teir Tjaldur at skjóta 43 mál og tað er ov galið.

Hjá runavíkingum er lítið mætari. Gamaní skjóta teir 43 ferðir bóltin í málið, men teir loyva hoyvíkingum framat 36 ferðir og tað er alt í verðini ov nógv. Hvussu hava teir hugsa sær at koma longur upp í stigatalvurnar, tá liðini, sum eru niðanfyri sleppa at skjóta 36 mál?

**Besta avrikið**

Úrslitið av dystinum í Havn leygardagin hevur við sær, at Tjaldur antin endar sum nummar fýra ella fimm. Hetta er besta avrikið hjá Tjaldri og uttan iva neyðugt skal hondbóltinum vera lív lagað í Runavík.

Einki er at ivast í, at tað er fótbólturin sum kemur í fremstu røð, men spurningurin er tó, um ein býur sum Runavík ikki eigur at hava eitt lið í bestu hondbóltsdeildini. Fólkatalið talar fyri tí og tað gera hallarumstøðurnar eisini. So er bara spurningurin um at fáa tingini at virka sum tey skulu.

Hjá hoyvíkingum má árið vera eitt stórt vónbrot. Teir liggja næst niðast í stigatalvuni og teir munnu vita, at tað bara er teimum sjálvum fyri at takka, at teir liggja har. Felagið satsaði annars stórt undan hesum kappingarárinum, men tað skuldi tó ikki ganga sum hoyvíkingar høvdu ætlað. Tað sást í dystinum móti Tjaldri eins væl og tað hevur verið til at fingið eygu á í øðrum dystum í ár.

**Dysturin í tølum**

H71: Bjarni Wardum 12 (1), Kristian Petursson 8, Halgir D. Olesen 6, Finnur Hansson 5, Johnny Djurhuus 4 og Rúni Patursson 1

Tjaldur: Dragise Stojovic 10, Mortan Hansen 9 (3), Zoran Sarcevic 8, Sverri Justinussen 7, Dan Thorleifsson 4, Thomas Magnussen 2, Hartvig Joensen 2 (1) og Tórhallur Thomsen 1 (1)

Brotskøst: H71 3, Tjaldur 6

Útvísingar: H71 7, Tjaldur 5

Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum og Hannis Wardum



Búskapur og vinna:

### Oljuprísurin upp

Óttin fyri einum amerikanskum álopi á Irak hevur gjørt, at oljuprísurin á altjóða marknaðinum er farin at hækka. Tann 20. februar var prísurin 19,55 dollarar fyri tunnuna, men fríggjadagin í síðstu viku var hann komin upp á 22,21 dollarar fyri tunnuna.

Irak framleiðir millum hálvt triðja og trý prosent av heimsins olju, og eitt møguligt kríggj fer uttan iva at steðga irakska oljuútflutninginum og ávirka útboðið og harvið prísin. Amerikanska stjórnin skal hava fund við fyrrverandi irakskar heryvirmenn seinni í hesum mánaðinum, og fyrst í næsta mánað skal bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, hitta George W. Bush, forseta at umrøða eitt møguligt hernaðarátak ímóti Irak.

Tey ellivu londini í OPEC skulu halda fund fríggjadagin í hesari vikuni at viðgera viðurskiftini á olkjumarknaðinum.

### Rindar helvtina aftur

Fyrrverandi stjórin í svensku risafyritøkuni ABB, Percy Barnevik, hevur gjørt av at afturrinda sínum gamla arbeiðsgevara 548 av teimum 930 mió. svensku krónunum, sum hann fekk í pensjón, tá hann fór úr stjórastarvinum. Samstundis hevur eftirmaður hansara í starvinum, Gøran Lindahl, valt at afturrinda ABB 286 av teimum 517 mió. krónunum, sum hann fekk í pensjón.

Tað elvdi til stóra øsing í Svøríki, tá fjølmiðlarnir herfyri bóru tíðindini um tær ovurstóru pensjónirnar hjá Percy Barnevik. Tað gjørdi ikki støðuna betur, at hann hevði fingið pensjónina, samstundis sum ABB fyri fyrstu ferð hevði stórt hall í ársroknskapinum. Ta fyrstu tíðina sýtti Barnevik fyri at gera nakað við málið, men nú hevur hann so valt at slaka fyri teimum nógvu atfinningunum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Biðja fyri sínum og lova hevnd

**Meðan tey hernaðarligu álopini hildu fram, savnaðust ísraelsmenn sunnudagin at biðja fyri teimum deyðu og at krevja hevnd.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

"Jødar mugu standa saman", "Ein og hvør skal hjálpa bróðuri sínum" og "Brøður jøda mugu vera sterkir".

Hetta vóru nøkur av orðunum á plakatum, sum sunnudagin vóru at síggja uttan fyri matstovuna í Jerusalem, har ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður sprongdi seg í luftina leygarkvøldið og tók ellivu ísraelsmenn við sær í deyðan.

Matstovan er tætt við París-staðið, har ísraelsmenn, sum eru ímóti ófriðinum plaga at ganga friðargongu, og fleiri av gestunum á matstovuni vóru júst komnir frá einum tílíkum friðartiltaki, tá tann palestinski sjálvmorðsbumbumaðurin fór upp í røðina uttan fyri dyrnar.

Fuad Horani var úr einari flóttafólkalegu sunnan fyri Betlehem, og eingin av gestunum óraði ilt, tá hann kom til matstovuna og fór upp í røðina. Brádliga sprongdi hann bumbuna, sum hann hevði uppi á sær. Spreingingin var so sterk, at matstovan varð fullkomuliga oyðiløgd.

**Álop neyðug**

Tey flestu, sum vóru komin saman uttan fyri matstovuna sunudagin, tóku undir við, at ísraelski herurin skal halda fram við álopunum á palestinar, og at herurin eigur at fara harðliga fram.

- Teir royna at beina fyri ísraelska viljanum, men tað fer ongantíð at eydnast teimum. Ongantíð. Eg búgvi her, og her ætli eg mær at verða verandi, segði tann 26 ára gamli Nachman Rosenberg. Hann og 22 ára gamla kona hansara vóru komin at biðja fyri teimum ellivu, sum doyðu í spreingingini, og tey vóru á einum máli um, at áhaldandi álop á palestinararnar er tað einasta, sum kann tryggja varandi frið.

Tveir studentar á lærda hebraiiska háskúlanum í Jerusalem, sum eisini vóru komnir at biðja uttan fyri matstovuna, høvdu somu áskoðan:

- Vit noyðast at rudda borðið, áðrenn talan kann verða at fara undir samráðingar. Tað merkir, at vit noyðast at útrudda yvirgangin fyrst, søgdu teir.

Júst spurningurin um samráðingar verður høvuðsboðskapurin hjá amerikanska semingsmanninum, Anthony Zinni, sum kemur til Miðeysturs seinni í vikuni. Hann er fyrr farin tómhentur heimaftur, og tað eru fleiri, sum halda, at ferðin hesaferð er miseydnað longu frammanundan.

Aðrir eygleiðarar halda, at ein ávís vón er, eftir at bæði USA og ES hava víst størri vilja til at fáa enda á kreppuni.



*Hendan kvinnan, sum var millum gestirnar á matstovuni í Jerusalem, var heppin at sleppa við lívinum*

*Mynd: Reuters*

# Valið í Zimbabwe longt

**Bíðirøðirnar vóru so langar við valstøðini í Zimbabwe, at neyðugt var at leingja valið við einum degi.**

ZIMBABWE
*Árni Joensen*

Tað var eftir áheitan frá andstøðuni, at hægstirættur í Zimbabwe gjørdi av at leingja valið við einum degi, og tí lótu valhølini uppaftur í gjár. Andstøðan hevði kravt, at øll valhølini í landinum skuldu vera opin í gjár afturat, men tað vildi stjórnin ikki góðtaka. Kortini ásetti rætturin, at valhølini í høvuðsstaðnum Harare og grannabýnum Chitungwisa skuldu lata uppaftur mánamorgunin. Júst hesir báðir býirnir verða mettir sum tvær av háborgunum hjá andstøðuni.

Valið í Zimbabwe byrjaði leygardagin og helt fram sunnudagin, og báðar dagarnar stóðu fólk í longum bíðirøðum og bíðaðu eftir at sleppa at velja. Andstøðan legði stjórnina undir at hava skipað so fyri, at fá valstøð vóru í teimum stóru býunum, har andstøðan hevur stóra undirtøku. Hinvegin vóru nógv valstøð á bygd, har flokkurin hjá Robert Mugabe, forseta stendur sterkur.

Tað er enn óvist, nær úrslitið av valinum verður almannakunngjørt, men spenningurin um úrslitið er sera stórur.

Zimbabwiski herurin hevur boðað frá, at hann fer ikki at viðurkenna úrslitið, vinnur andstøðan, og tí bera eygleiðarar ótta fyri hernaðarkvetti, skuldi andstøðan vunnið.

Úr Norðurlondum:

### Nei til ES

Ein meiningakanning hjá blaðnum Nationen vísir, at alt fleiri norðmenn eru ímóti, at landið fer upp í ES. Sambært kanningini siga 48,4 prosent nei til ES-limaskap, meðan 41,6 prosent siga ja. Samanborið við seinastu kanning er mótstøðuparturin øktur eitt prosent.

Tey, sum eru fyri norskum limaskapi í ES, eru kortini fegin um úrslitið, tí tað vísir, at undirtøkan fyri ES-limaskapi munandi meiri støðug nú, enn hon hevur verið fyrr.

### Nú skal hann frá

Meirilutin í býráðnum í donsku kommununi Farum samtykti um vikuskiftið at koyra tann umstrídda Peter Brixtofte úr borgarstjórasessinum og at velja ein skuggaborgarstjóra í hansara stað. Avgerðin verður løgd fyri býráðið á fundi í kvøld og skal síðani viðgerast á einum eyka býráðsfundi, sum ætlandi verður fyrsta dagin. Samtykkir býráðið avgerðina hjá meirilutanum, skal innanríkisráðharrin, Lars Løkke Rasmussen, staðfesta hana, áðrenn Brixtofte kann koyrast frá.

Býráðsmeirilutin í Farum krevur borgarstjóran frá, tá hann breyt lógina, tá hann vegna kommununa tók eitt lán upp á 250 mió. krónur í apríl í fjør uttan at kunna býráðslimirnar um tað.

### Heiðursløn

Svenska stjórin hevur samtykt at stovna eina heiðursløn til minnis um barnabókarithøvundin Asatrid Lindgren, sum doyði herfyri. Heiðurslønin er fimm mió. svenskar krónur og skal latast einum einstøkum rithøvdundi, men hon kann eisini latast einum felagsskapi ella stovni, sum virkar fyri at fáa børn og ung at lesa meiri. Heiðurslønin verður fyrstu ferð latin tann 8. mars næsta ár.